## Frá luttakara:

*”Eg havi havt stóra gleði og gagn av at koma til listterapi. Tað hevur ikki bara givið mær nøkur amboð at liva við krabbameininum, men eisini viðvíkjandi øðrum dagligum avbjóðingum.Tað at møta øðrum, sum hava upplivað lívsins myrku síður, hevur havt ótrúliga stóran týdning. Mær hevur manglað møguleikan at koma eeinastaðni, har tú kanst vera tú sjálv, kanst gráta og fortelja um tankar, tú vanliga ikki tosar um. Eg havi veruliga glett meg til hvørja ferðina. Eg føli eina broyting innan í mær sjálvari, og gagn -ar tað ikki bara mínum nærmastu, men eisini øðrum, eg havi við at gera. Eg takki tí nógvar ferðir fyri alt, og eg hopi, at tilboðið um skeið í listterapi fer at halda fram í fel-agnum.”*

*”Orðið listterapi ræddi meg eitt sindur, men í dag eri eg sera glað fyri, at eg fekk tilboðið og valdi at taka av. List-terapiin hevur verið lærurík og gevandi fyri meg. Eisini sa-manhaldið við hini í bólkinum var sera gott. Eg havi lært, at tað ber til at liva við krabbameini.”*


**KRABBAMEINSFELAGIÐ**

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO-110 Tórshavn

Telefon: 31 79 59
www.krabbamein.fo
T-post: kmf@krabbamein.fo


krabbameinsfelagið

# Listterapi

Krabbameinsfelagið
*Umsorgan fyri tær*



1. februar 2019

## Listterapi við Fíu Lamhauge

Fía Lamhauge er leiðmennari -life coach- og listterapeutur.

Listterapi er eitt tilboð til tín, ið hevur ella hevur havt krabbamein. Royndirnar frá skeiðunum eru sera góðar og vísa, at listterapi er ein góður háttur at stuðla fólki, ið er ella hevur verið rakt av álvarsligari sjúku.

### SKEIÐIÐ

Kundi tú hugsað tær at verið partur av lítlum bólki, har tú:

- undir tagnarskyldu fært sett orð á tína støðu við fólk, sum skilja teg og kenna seg aftur í tí, tú hevur á hjarta?

- ikki hevur fyri neyðini at taka atlit til tey, tú vanliga heldur teg skula verja fyri tínum innastu tonkum og kenslum?

- umframt prátið fært møguleikan at úttrykkja teg við t.d. tekning, máling ella skriving, og har tað er ein fyrimunur ikki at vera vanur við at úttrykkja seg kreativt?

- ígjøgnum felagsprátið, kreativitetin, hugnan og nakað av undirvísing kanst fáa tað lættari við tínum avbjóðingum?



### SAMBAND

Um hetta ljóðar sum nakað fyri teg, kanst tú seta teg í samband við Krabbameinsfelagið við at ringja 317959 ella senda teldubræv til kmf@krabbamein.fo og melda teg til tilboðið.

Listterapi er 1 ferð um vikuna í 10 vikur.

### Tað er ókeypis at luttaka

Hevur tú spurningar viðvíkjandi tilboðunum hjá Krabbameinsfelagnum, kanst tú seta teg í samband við okkum við at ringja 317959 ella senda teldubræv til kmf@krabbamein.fo



*Fía Lamhauge life coach og listterapeutur*